## Fyrrverandi leiðari upp

Umstríddi leiðarin á bústovninum á Mýruni hevur sagt seg úr starvi. Sambært útvarpinum vilja hvørki leiðarin sjálvur ella stjórin í Nærverkinum, Mary í Garði, vátta ella avsanna tíðindini, sum útvarpið hevur frá fleiri keldum. Leiðarin varð fluttur í annað leiðandi starv á einum bústovni í Sørvági, meðan løgreglan framvegis kannar, um hann skal ákærast fyri ein tilburð av harðskapi móti einum búfólki á Mýruni, sum hann er meldaður fyri. Nærvarpið kannar eisini málið, tá eitt búfólk breyt mjødnina. Harumframt hevur Pedagogfelagið sent eina kæru móti Nærverkinum til Umboðsmannin, tí felagið metir, at Nærverkið hevur drálað í málinum.



## Vespurnar vaknaðar

Starvsfólkini á røktarheiminum Lágargarði fingu sær ein kvøkk leygardagin, tá hendan stóra vespan leikaði í í vindeygakarminum. Men tað slapp hon ikki leingi, tí vups... avísir eru góðar at drepa við (tá tær eru lisnar). Starvsfólkini vóru samd um, at hetta var størsta vespan tey nakrantíð høvdu sæð. Á myndini er hon nakað kropin, tí hon er deyð. Fólk hava longu sæð fleiri vespur í eysurbýnum í Havn, so kanska er eitt reiður nærhendis røktarheiminum. Men løgið kortini, at vespurnar longu gera um seg, hóast vit bert eru í apríl og kavin fjalir landið.

# 36 gávuríkar pop-gentur bjóðaðu seg fram

**Hóast kalt og kavi, leitaðu heilar 36 ungar gentur sær niðan í útvarpshøllina til upptøkuroynd leygardagin. 11 komu víðari, men endaliga úrslitið er ikki alment enn**

POPPUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Rigmor Dam*

36 vónríkar ungar gentur løgdu líka í hvat hini siga, tá tær vóru til audition til ein komandi pop-bólk leygardagin. Flestar fylgdust við onkrum vinkonum, meðan aðrar høvdu eina mammu ella pápa við. Uppaftur aðrar høvdu bæði sheik og bil við. Hetta segði eisini nakað um aldursbólkin – millum 16 og 26 ár – har er stórur munur á tí yngstu og elstu.

Seint leygardagin gjørdist greitt, at 11 gentur vóru komnar víðari, og av teimum skuldu dómararnir velja nakrar fáar til ein popbólk. Enn er loyniligt, hvørjar vórðu valdar.

Tað eru teir báðir vælkendu stjørnumakararnir Kári Jacobsen og Eyðfinn Jensen sum leita eftir gentum til ein nýggjan poppbólk. Tí skuldu genturnar bæði prógva, at tær duga at syngja, dansa og at framføra.

Teir báðir hava bæði saman og hvør sær staðið aftanfyri hópin av tónleika-verkætlanum gjøgnum árini. Millum annað minnast vit gentubólkin PoppKorn, sum gjørdist ein av best seljandi føroysku bólkunum nakrantíð.

- Hesaferð er ætlanin tó at samanseta ein øðrvísi bólk. Nevniliga við vaksnum og/ella næstan-vaksnum gentum, sum tónleikaliga og sjónliga vendir sær til hin vaksna lurtaran, siga teir báðir, sum eisini siga seg leggja dent á tónleikaliga og sangliga dygd, søgdu teir áðrenn upptøkuroyndina leygardagin.







# Ætlaðu at lúgva fyri politinum

**Tvær fullar kvinnur sum koyrdu útav uppi í Hoyvík sunnunáttina, royndu til fánýtis at fáa vitni til at siga seg hava koyrt bilin. Nú eru báðar tvær skuldsettar fyri rúsdrekkakoyring.**

POLITIMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tvær fullar kvinnur tímdu eftir øllum at døma ikki at ganga allan vegin oman í býin úr Hoyvík sunnunáttina. So tær tóku bilin, koyrdu útav vegnum og vóru knappliga høvuðspersónar í einum ferðsluóhappi. Tær sóu nú fyri sær, at koyrikortini vóru í vanda, og settu tær seg í samband við ein persón, sum gekk framvið, og royndu at fáa hann at átaka sær ábyrgdina, við at siga at hann koyrdi bilin. Tá hetta miseydnaðist gjørdu tær av ikki at fortelja løgregluni, hvør teirra koyrdi. Men hetta gongur ikki, tí sambært vakthavandi á politistøðini verða báðar tvær skuldsettar fyri rúsdrekkakoyring, um tær ikki siga hvør teirra koyrdi. So nú kunnu tær báðar vænta sær at missa kortið.

Hendingin fór fram uppi í Hoyvík, har tær í allari hálkuni fóru skríðandi omaneftir bróttu Mannbrekku, sleingjandi úr á Hvítanesvegin og síðani víðari omaneftir – fyrst upp á gongubreytirnar og síðani upp á oyggjarnar. Til endans steðgaði bilurin uppi á høvdini yvir plantaguni, og fór til alla lukku ikki útav aftur, tí har er sera bratt omanav.